ítróttur

Nr. 189 • mikudagur • 5. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Nýggir menn í hópinum

**Tað er ikki bara á spælarasíðuni, at útskiftingar í landsliðshópinum henda**

LEIÐARAR
*Jákup Mørk*



*At ansa eftir fangum á politistøðini og at ansa eftir føroyskum fótbóltsspælarunum man ikki vera heilt ólíkt. Í hvussu so er tykist starvið sum fangavørður at vera gott viðmæli, tá ferðaleiðarar hjá fótbóltslandsliðnum skulu finnast*

**Kastrup, Danmark:** Umframt Berg Midjord, sum er spildurnýggjur spælari í landsliðshópinum, so telur føroyska ferðalagið eisini aðrar nýggjar mans á leiðarasíðuni.

Aloftast hava tað verið tveir av temum fýra, Birgir Hansen, Sigurd Hansen, Kára Nielsen og Heðin Askham, sum hava verið ferðaleiðarar hjá landsliðnum, men til ferðina hesa ferð lá hetat tó ikki so væl fyri. Kári er saman við Birgiri venjari hjá besta mansliðnum hjá Kyndli, og tí bar illa til, um báðir teirra vóru við á ferðini. Heðin er í løtuni staddur í Svøríki við yngri landsliði, og tá tað eisini barst Sigurd frá at koma við á ferðini, stóð greitt, at nýggjar kreftir skuldu til.

## Feðgar á ferð

Her fall valið so á feðgarnar báðar, Per og Bárður Olsen. Per hevur seinnu árini havt fastan kjans í køkinum hjá FSF, og skuldi nýggjur maður við, so var tað tí ikki ónáttúrligt at spyrja hann eftir. Og sum spildurnýggjur er jú eisini hent, at ein triði leiðari er við á ferðini, og hesum játtaði Bárður so eisini alt fyri eitt.

Dagliga starvast Per annars sum fangavørður, og tað er sama starv, sum bæði Heðin Askham og Birgir Hansen hava. Av teimum 12 fangavørðunum, sum eru í starvi í Føroyum, er ein fjórðingur soleiðis burturstaddur í fótbóltsørindum í løtuni, men teir báðir roknaðu kortini við, at hetta mundi fara at ganga.

Til stuttleikar hildu leiðararnir eisini, at nú Per er somikið vanur at matgerða fyri FSF, so kann hann eisini vera hentur av hava, um tað skuldi víst seg, at ísraelittar fara at halda somikið fast um Sabbathina, at einki etandi fæst á hotellinum dystardagin. Men so galið man tað tó neyvan fara at ganga.

# Mortan gloymdi passið

**Ein av heldur stuttligu trupulleikunum kom í ljósmála, tá flogfarið hjá Atlantsflogið hevði sett seg í Keypmannahavn um hálvgumtólvtíðina týsdagin**

LANDSLIÐSFERÐ
*Jákup Mørk*

**Kastrup, Danmark:** Tá spælararnir skuldu kekka út av flogvøllinum varð nevnliga funnið fram til, at Mortan úr Hørg ikki hevði passið uppi á sær. Tá viðførið varð pakkað, hevði sumbingurin á landsliðnum av misgávum lagt passið saman við klæðum og øðrum av tí, sum var í viðførinum, og tí bara illa til at fáa fatur á hesum, fyrr enn komið var ígjøgnum passeftirlitið.

Men enn einaferð var sjón fyri søgn, at í Føroyum »kenna øll øll«. Stjórin hjá Atlantic var eisini við í flogfarinum, og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn samband varð fingið við føroysku skrivstovuna í Kastrup, sum so kundi syrgja fyri, at passið kom aftur til rætta eigaran. Og ikki minst at Mortan framhaldandi var partur av hópinum, tá kósin varð sett móti Zürich.

**-mørk**



*Góð ráð vóru dýr, tá Mortan úr Hørg kom eftir, at passið lá saman við restina av viðførinum í kuffertinum. Men lukkutíð varð trupulleikin skjótt loystur*

# Drúgv landsliðsferð

**Tíðliga týsmorgunin gekk leiðin til Vágar, og ikki fyrr enn klokkan 3 hósnáttina er føroyska fótbóltslandsliðið komið á hotellið í Tel-Aviv**

LANDSLIÐSFERÐ
*Jákup Mørk*



*Spælarar og leiðarar á flogvøllinum í Kastrup. Spurningurin er helst, hvussu næstu seks tímarnir skulu dvøljast, áðrenn ferðalagið aftur savnast*

**Kastrup, Danmark:** Tað er ein av heldur drúgvaru landsliðsferðunum, sum er á skránni, nú seinasti dysturin í inniverandi HM-undankappingini er á skránni.

Ísrael liggur sum vera man nógvar kilometrar frá Føroyum, men eitt eru kilometrar. Annað er, hvussu flogruturnar skulu setast saman, tá vinnast skal á mongu kilometrunum.

Og hesa ferð gongur ferðin yvir trý ymisk flogfeløg, og ætlandi skuldu 18 tímar fáast frá hondini, áðrenn spælararnir kundu leggja seg í hotel-sengur sínar í Tel-Aviv.

Longu kl. 8.15 fór flogfarið hjá Atlantsflog úr Vágum, og tað vil siga, at flestu spælararnir máttu heiman ífrá í seinasta lagi um sjey-tíðina týsmorgunin. Í danska høvuðsstaðnum var bíðitíðin tó hampuliga long, og ikki fyrr enn 19.45 skuldi ferðin ganga víðari. Hesa ferð til Zürich í Sveis.

Her verður bíðitíðin tó ætlandi ikki eins long. Eftir steðg upp á knappan tíma fer næsta flogfarið hjá Swiss-Air til Tel-Aviv, og ikki fyrr enn um trý-tíðina lokala tíð roknar føroyska ferðalagið við at vera komið upp á pláss.

Tá stendur hvíldin so ovast á skránni, og mikumorgunin verður so av álvara farið undir fyrireikingarnar til seinastu altjóða uppgávuna á árinum.